## Børn fara svong í song

Um alt Grønland gingu fólk mótmælisgongu um vikuskifti, har tey mótmæltu, at hvønn einasta dag eru tað børn í Grøalandi, sum ikki fáa ta neyðugu umsorganina. Tað var ungdómsdeildin hjá flokkinum Siumut, sum skipaði fyri tiltakinum. Næstformaðurin, Mads Petersen, sigur við KNR, at grønlendska samfelagið kann ikki góðtaka, at børn fara svong í song ella sova í trappunum. Hetta er ein samfelagstrupulleiki, sum má loysast, sigur hann.



## Vorðið sum hummari

75 ára gamli norðmaðurin Anfinn Solheim vildi illa trúgva sínum eygum, tá hann nú um dagarnar fekk ein óvanliga stóran hummara. Anfinn Solheim sigur við norsk bløð, at hann hevur onkuntíð fyrr fingið hummara, sum hevur vigað trý kilo, men tann, sum hann fekk í síðstu viku, vigaði heili 5,2 kilo. Hummarin bleiv ikki etin, men hann bleiv heldur ikki koyrdur burtur. Tann hepni veiðimaðurin hevur gjørt av, at hann verður útstoppaður.



*Skeinkiloyvi hjá Mentanarhúsinum var gingið út fyri umleið einum ári síðan, tá løgreglan stongdi alt barrvirksemið í húsinum tíðliga sunnunáttina. Málið verður latið fútanum til støðutakan*

# Løgreglan stongdi barrvirksemið

**Skeinkiloyvið hjá Mentanarhúsinum í Fuglafirði var langt síðan gingið út, tá løgreglan setti sær fyri at kanna hesi viðurskifti sunnunáttina**

FUGLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnunáttina, tá finaluumfarið var í stóru tónleikakappingini GBOB í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, gjørdi løgreglan í Eysturoy av at steingja alt barrvirksemið í húsinum.

-Vit vóru fyrst í Mentanarhúsinum leygarnáttina og kannað eftir, hvør sat í barruni, og sunnunáttina vóru vit aftur og stongdu alt barrvirksemið.

### Loyvi ov gamalt

Løgreglan í Runavík sigur, at teir høvdu fingið frænir av, at skeinkiloyvið hjá Mentanarhúsinum ikki var í lagi, men var gingið út.

- Tað vísti seg, tá ið vit kannaðu málið nærri, at skeinkiloyvið var gingið út fyri umleið einum ári síðan. Vit gjørdu tí av at steingja alt barrvirksemið.

Fríggjakvøldið var undanumfar í GBOB-kappingini, har 16 tónleikabólkar kappaðust um at sleppa víðari til finaluna leygarkvøldið.

Leygarkvøldið fóru so 8 bólkar á pallin um at gerast Føroya besti bólkur, og úrslitið gjørdist, at Boys in a Band gjørdist vinnari av kappingini.

Bólkurin Story Ends endaði á einum øðrum plássi – og fyribils er barrvirksemi í Mentanarhúsinum so eisini endað sum ein "story ends".

Løgreglan fer nú at skriva frágreiðing um málið sum síðan verður latið fútanum til støðutakan.

### Herverk á bátar

Løgreglan í Eysturoy siga, at hóast ymisk tiltøk vóru í oynni í vikuskiftinum, tørnaði alt rímiliga friðarligt út kortini.

- Vit høvdu eitt rímiliga friðarligt vikuskifti, men í Fuglafiðri høvdu ótangar gjørt seg inn á bátar, sum lógu í bátahylinum, sigur løgreglan.

# Vandamikil vegur

**Fríggjakvøldið hendi tað aftur. Ein bilur, sum var á veg niðan úr Norðoyartunlinum og niðan á vegin, sum gongur millum Leirvík og Vík, koyrdi tvørtur um vegin og endaði á takinum hinumegin vegin**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fleiri ferðsluóhapp eru hend á vegastrekkinum, har vegaføringin úr Norðoyatunlinum kemur niðan í vegin, sum gongur út á Vík í Leirvík.

Og fríggjakvøldið um 19.25-tíðina hendi tað aftur.

Ein bilur úr Havn, sum var á veg úr Klaksvík og aftur til Leirvíkar, gáaði ikki eftir sneiðingini á vegnum, tá hann koyrdi út á vegin, sum gongur úr Leirvík út á Vík.

### Fór runt

- Bilførarin koyrdi beint fram, fór tvørtur um vegin og endaði hinum megin vegin.

Løgreglan í Eysturoy sigur, at eini 4-5 ungir menn vóru í bilinum, og hóast bilurin fór runt í fallinum, hendi tíbetur eingin mansskaði.

- Vitni, sum sá bilin, sigur, at ferðin ikki var so ógvuslig, men helst hevur bilurin koyrt einar 80 km./t

Løgreglan sigur, at fleiri ferðsluóhapp hava verið júst á hesum vegastrekki, síðan Norðoyatunnilin læt upp.

- Eg havi verið á staðnum í einum tveimum umførum, og mær vitandi er talan um eini sjey ferðsluóhapp av slíkum slagi á hesum vegastrekki.

### Ov myrkt

Løgreglan heldur, at ilt er at siga nágreiniliga, hvat tað er, sum ger, at tað er so trupult at koma niðan av tunnilsvegnum og niðan á vegin, sum gongur millum Leirvík og Vík.

- Eitt er, at hetta er eitt myrkt og helst ov illa uppmerkt vegastrekkið. Í aðrar mátar virkar tað fyri fleiri bilførarar, sum um vegurin bara gongur beint fram, tá tú kemur niðan ímóti.

Løgreglan vónar, at avvarðandi myndugleikar fara at hyggja nærri upp á hetta vegastrekkið, áðrenn vanlukkan hendir.

### Vandamikið

- Her er nógv tung ferðsla á leiðini, og tí kann tað gerast rættiliga vandamikið, tá bilur kemur niðan úr tunlinum og koyrir beint út á vegin. Higartil hava bilførarar, sum eru komnir soleiðis fyri, verið ógvuliga hepnir, sigur løgreglan í Eysturoy.

# Datt oman í Tjørnuvík

**Ein 55 ára gamal tjørnuvíkingur læt lív sunnudagin, tá hann datt oman nærindis Sjeyndum**

TJØRNUVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnudagin hendi ein syndarlig vanlukkan nærindis Sjeyndum, norðanfyri bygdina í Tjørnuvík.

Tveir mans vóru farnir norður eftir gæsnum, teir áttu í haganum, tá annar teirra var áhaldsin og fór á glið.

Tað var vátt í veðrinum, og maðurin fekk ikki fótafestið aftur. Hann gleið omaneftir lendinum, og fallið var einar 40 metrar niður í sjógv.

### Afturfunnin

Tyrlan og Eiðis Bjargingarfelag vórðu boðsend, og tað var bjargingarfelagið, sum fann tann 55 ára gamla tjørnuvíkingin deyðan á sjónum.

Á Politistøðini í Havn visti vakthavandi ikki meira at siga um hendingina.

Jón Klein Olsen hevur málið um hendi, men hann var ikki at hitta, tá ið vit vóru í samband við løgregluna í morgun.